Útbjóðing

# Oyggjaleiðir

SL fara við hesum alment at bjóða út arbeiði at bøta um Smyril, Dúgvuna og Rituna.

### Útbjóðingin fevnir um:

**Málaraarbeiði**
· Innanduramáling av veggum og loftum v.m.
**Gólvarbeiði**
· Umvæling av gólvum
· Veiting og álegging av teppum og vinyl
**Snikkaraarbeiði**
· Umvæling av borðum og veggum
**Møblaarbeiði**
· Vasking, reinsing og umvæling av sofum
· Veiting og uppseting av stólum
· Veita og hanga upp gardinur
**VVS-arbeiði**
· Skifting av vøskum v.m.

**Krøv**
· Hesi arbeiði verða øll boðin út undir einum.
· Útbjóðingin skal virka fyri, at ferðafólkini kenna eina hækking í tænastuni.
· Øll krøv og treytir verða ásett í útbjóðingartilfarinum.

**Tilboð**
Tilboð, merkt Útbjóðing Oyggjaleiðir skullu verða innkomin til:

**Strandfaraskip Landsins**
att. Tekniska Deild
Postrúm 88
FO-110 Tórshavn

í seinasta lagi 14. mars 2002, kl. 15:00.

SL skilar sær fullan rætt til at velja millum innkomin tilboð, ella ikki taka av nøkrum. Teir arbeiðstakarar, sum bjóða, kunnu verða hjástaddir, tá tilboðini verða latin upp. Sæð verður burtur frá tilboðum, sum ikki eru innkomin til tíðina.

Útbjóðingartilfar kann umbiðast hjá SL, tlf. 343000 ella t–post: sua@ssl.fo Áðrenn útbjóðingartilfar verður sent út, skulu kr. 500,- latast í depositum.

Nærri upplýsingar um útbjóðingina kunnu fáast við at venda sær til Súna Andreassen á Teknisku Deild.

STRANDFARASKIP LANDSINS

*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 150 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 11 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

# Deildarskrivari Søgu- og samfelagsdeildin

**Fróðskaparsetur Føroya**

Søkt verður eftir deildarskrivara á Søgu- og samfelagsdeildini frá 1. apríl ella skjótast til ber.

**Uppgávur**
Deildarskrivarin er høgra hond hjá megindeildarleiðaranum og ein av meginásunum á deildini. Deildarskrivarin tekur sær av vanliga skrivstovuarbeiðinum, sum er:
- samskifti við studentar, lærarar, seturskrivstovuna og onnur
- fyrireiking og uppfylging av fundum
- próvtøku fyrisiting
- brævaskifti og journal
- dagliga fíggjarfyrisiting á deildini í samstarvi við deildarleiðara og seturskrivstovu

**Førleikakrøv**
Skrivaraarbeiðið er sera áhugavert, fjølbroytt og sjálvstøðugt. Krøv verða tí sett til:
- evni at arbeiða sjálvstøðugt
- evni at samskifta og samstarva við onnur
- góðan kunnleika til føroyskt, danskt og helst eisini enskt
- góðan kunnleika til fíggjarviðurskifti
- góðan kunnleika til edv

**Setanarviðurskfiti**
Starvið er 3/4 starv og verður lønt í 3. flokki sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til megindeildarleiðaran, Jóan Paula Joensen, Søgu- og samfelagsdeildin á telefon 317009 og 224371 ella jopajo@setur.fo.

Umsókn við ævilýsing, avriti av prógvum, váttan um arbeiðsroyndir, viðmælum o.l. verður at senda Søgu- og Samfelagsdeildini í seinasta lagi 20. mars 2002.

Fróðskaparsetur Føroya
**Søgu- og samfelagsdeildin**
J. C. Svabos gøta 14,
FO 110 Tórshavn.

Endamálið hjá Søgu- og samfelagsdeildini er hægri undirvísing og gransking. Á deildini starvast 6 lærarar og granskarar. Deildin hevur studentar, ið lesa søgu og stjórnmálafrøði, umframt fleiri lesandi, ið taka støk skeið. Deildin hevur nógv samband úteftir.

Visti tú ikki tað? Sosialurin

www.sosialurin.fo




11 persónar minibussur.

Vælhildin TOYOTA Hi.Ace
Turbo Diesel minibussur.
Pláss: 3 + 3 + 3 + 1 + 1.
Árg.: Maj 1999
KM. 47.000 til sølu.

prísur: kr.178.000,-

Pf. D. B. Bilar Tlf. 310-600


# Ársaðalfundur

Ársaðalfundur hjá Felagnum Tórshavn verður

***sunnudagin 17. mars 2002 kl. 15⁰⁰***

á Hotel Hafnia.

Uppskot til mál, ið ynskjast viðgjørd á aðalfundinum, skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagið mikudagin 6. mars 2002.

Dagsskrá fyri ársaðalfundin verður send limum felagsins í brævi sambært viðtøkum felagsins.

**Nevndin**


Brandt Blomberg




Hvítvørur til føroyska húsarhaldið
- 6 kg turr klæðir
- 600-1600 snúningar
- Tíðarstýring 1-24 tímar
- Orkuklassi A
- Vaskievni A
- Centrifugeringsevni A

prísur fyrr 9.995,-
Nú 8.995,-

pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460




**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi partafelag:**

Skrásetingar-nr. P/F 3322
Navn: P/F Íløgufelagið í Hvalba

Adressa: 850 Hvalba

Kommuna: Hvalbiar Kommuna
Stovningardato: 29.01.2002
Viðtøkudato: 29.01.2002
Kapitalur: Kr. 3.250.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 3.250.000,00 til kurs 100.
Stovnarar:P/F Steintór, 850 Hvalba (P/F 2273), P/F Niels Pauli, 850 Hvalba (P/F 2300), Arbeiðsmannafelagið Roynd v/Fríolvur Eysturberg, 850 Hvalba, Arbeiðskvinnufelagið Roynd v/Mariannu Poulsen, 850 Hvalba, P/F Brestur, 100 Tórshavn (P/F 2342) og P/F Kimbil, 100 Tórshavn (P/F 15).
Nevnd: Mikkjal Hammer, 850 Hvalba (formaður), Jacob Pauli D. Hammer, 850 Hvalba, Fríolvur Eysturberg, 850 Hvalba, Poula Mariane Poulsen, 850 Hvalba, Poul Hansen, Áarvegur 1, 100 Tórshavn og Sveinur Sigmundarson Poulsen, 850 Hvalba.
Stjórn: Sveinur Sigmundarson Poulsen, 850 Hvalba.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóra, nevndarformanni ella tveimum nevndarlimum.
Grannskoðari: P/F KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 29.01.2002 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at eiga partabrøv, reka íløguvirksemi og annað virksemi í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 22. februar 2002

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3314
Navn: Sp/f Trygdartænastan

Adressa: Áarrás 9, 160 Argir

Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 01.01.2002
Viðtøkudato: 01.01.2002
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: John René Vilhelmsen, Áarrás 9, 160 Argir.
Stjórn: John René Vilhelmsen, Áarrás 9, 160 Argir.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum.
Grannskoðari: P/F Grannskoðaravirkið Inpact, R.C. Effersøesgøta 26, Fo-100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 01.01.2002 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka handil, vinnu og annað í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 26. februar 2002

Kristin Balle

---

**Viðvíkjandi P/F 1189, P/F La femme et l´homme í likvidatión, 100 Tórshavn**

Vísandi til § 72 í " Lov om Aktieselskaber" frá 15. apríl 1930, skal Skráseting Føroya við hesum, heita á nevndina/likvidator í omanfyri nevnda felag, um innan 3 mánaðar frá í dag at upplýsa um felagið enn er til. Um Skrásetingin einki hevur frætt tá henda freist er farin, verður felagið strikað úr Skrásetingini.

Skráseting Føroya 27. februar 2002

Kristin Balle

---

# Búmerkjakapping

Nú Fuglafjarðar Mentannarhús er um at verða liðugt bygt, og væntandi verður tikið alment í nýtslu fyrst í juni mánaða, er avgjørt at skipa fyri búmerkjakapping.

Fuglafjarðar Mentannarhús hevur til endamáls at verða karmur um øll hugsandi mentannarlig tiltøk t.d. konsertir, framsýningar, stevnur, fundir, veistlir, dans o.a.

Búmerki skal kunna nýtast til alt vanligt virksemi í svart/hvítum prenti, eins væl og í litum.

Navnið Fuglafjarðar Mentannarhús skal kunna setast afturat búmerkinum.- samanseting av búmerki og navni eru tí vælkomin.

Uppskotið til búmerki kann verða í stødd A4 ella A5, men skal bæði kunna minkast og vaksast, so tað er nýtiligt á øllum, frá brævpappíri til plakatir.

Uppskotið skal verða navnaleyst og bera frámerki, sum er 5 tilvildarlig taltekn (siffur). Saman við uppskotinum skal latast inn afturlatin brævbjálvi við sama frámerki uttan, sum uppskotsetarin hevur á uppskoti sínum. Í uppskotinm skal vera navnaseðil á A4-síðu, sum sigur frá navni, bústaði og telefon hjá uppskotsetarnum. Tá ið dømingin er endað, verða allir brævbjálvar latnir upp.

Dómsnevndin, ið tekur støðu til innsendu uppskot, verður henda:

Rúni Abrahamsen, arkitektur AF - Eyðun Hansen, formaður í Sjónleikarafelagnum - Jógvan á Lakjuni, løgtingsmaður.

Til virðislønir eru avsettar 9.000 kr.
Dómsnevndin avgerð, hvussu virðslønirnar verða býttar. Tó skal 1. virðisløn skal ikki verða minni enn 5.000 kr.

Dómsnevndin skilar sær rætt til, ikki at nýta innkomin uppskot.

Vinnararnir verða kunngjørdir á hátíðarhaldi, í samband við at Mentunnarhúsið verður tikið alment í nýtslu.

Uppskotini verða at senda til Fuglafjarðar Sjónleikarafelag innan 10. maj 2002.

Takk fyri stuðulin.



Fuglafjarðar Sjónleikarafelag
Postsmoga 14
530 Fuglafjørður


STÓRT TILTAK Í ARGJA SKÚLA
Leygardagin 2/3-2002 frá kl. 15.00

Mattombola
Bommtombola
Café
Lutaseðlasøla
Klatriveggur
Skreiðirør
Fiskibrunnur
Hoppiborg
Ponyríðing
Sodavatnssøla



5.b í Argja Skúla


# Hondlesing í Tórshavn

## í døgunum 1.-4. apríl

Hondlesarin Marita er í Føroyum. Lesir tína hond – fortíð, nútíð og framtíð – styrki og veikleika. Ein annarleiðis máti at síggja teg sjálvan.

Ring og bið um tíð á

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo